


[www.oljan.fo](http://www.oljan.fo)

**Jan Müller** 11 - 12 - 2011

# Cairn selt í India

Skotska oljufelagið Cairn Energy, sum hevur leitað eftir olju í Grønlandi tey seinastu árini, hevur nú selt ein part av sínum virksemi í India, har felagið hevur havt munandi betri eydnu enn í Grønlandi. Keypari er Vedanta Resources, sum hevur goldið skotska felagnum 22 milliardir krónur, skrivar KNR. Cairn hevur júst boðað frá, at felagið fer ikki at bora eftir olju í grønlendsku undirgrundini næsta ár, og at leitingin verður ikki tikin uppaftur, fyrr enn felagið hevur fingið samstarv ið eit ella fleiri feløg um leitingina. Cairn hevur higartil brúkt fimm milliardir krónur til leitingina í Grønlandi. Cairn Energy hevur leingi tingast um at selja ein part av virkseminum í India, men sambært bretskum og indiskum fjølmiðlum hava teir indisku myndugleikarnir drálað við at góðkenna handilin.